## Formuladeildin, sunnudagin 9. apríl

| | |
|---|---|
| HB-EB/Streymur | Páll Augustinussen |
| ÍF-B36 | Dagfinn Olsen |
| KÍ-Skála | Georg Rasmussen |
| VB/Sumba-NSÍ | Lassin Isaksen |
| B68-GÍ | Jens Petur Brattalíð |

## 1 deild kvinnur sunnudagin 9. apríl

| | |
|---|---|
| B36-HB | Bergleif Sólsker |
| AB-NSÍ | Vinjard Dam |
| KÍ-GÍ | ÍF |
| EB/Streymur-SÍ | Eugen Voda |

## 1 deild menn leygardagin 8. apríl

| | |
|---|---|
| B71-TB | Regin Egholm |
| KÍ-SÍ | Ransin Djurhuus |
| Royn-FS Vágar 2004 | Jens Petur Brattalíð |
| VB/Sumba-AB | Petur Reinert |
| LÍF-HB | Jóannes Mikkelsen |

Fylg gongdini í 1 deild á www.olivant.fo leygardagin

## EB/ Streymur manglar mál

**HB-EB/STREYMUR**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hóast EB/Streymur fyri nøkrum árum síðani etableraði seg sum eitt av betru liðunum í bestu føroysku fótbóltsdeildini, so hevur felagsliðið ongantíð skorað ímóti HB í landskappingardysti í Gundadali.

Dystirnir í Gundadali hava verið nakað heilt fyri seg. Seinastu árini hava vit havt kjansir at gera tr ella f ra mál tíðliga í dystinum, men so er HB komið fyri seg, og vit hava tapt við fleiri málum, sigur Egil á Bø, verjuspælari hjá BE/Streymi.

Her hava vit nakað, sum vit kunnu broyta, og fyrr ella seinni fer tað at eydnast, sigur hann. EB/Streymur hevur einaferð skorað ímóti HB í Gundadali. Tað var í einum steypadysti, sum teir taptu 7-1.

Ronnie Samuelsen hevur havt ein minni skaða í vikuni, men hann verður væntandi klárur sunnudagin.

HB hevur alt sítt fólk klárt til næsta heimadystin í ár. Kári Nielsen var ikki við, tá ið HB vann ímóti ÍF, men hann er tøkur aftur, og venjarin fer uttan iva at finna pláss fyri honum á miðvøllinum, hóast HB spældi væl og vann stórt seinast.

Føroyar-Albania 81-1 (36-0):

# Føroyskt heimsmet í hondbóltsparodi

**Í einum glantrileiki í Sarajevo mátti neyðars albanska landsliðið leggja rygg til eitt tap, sum helst kann fara beina leið í metbókina. Tað vit vita um, er tað ikki komið fyri áður, at landsdystur í hondbólti er endaður við somikið stórum sigri**

**HONDBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Sarajevo:** Danska útgávan av Guinnes metbókini inniheldur tíverri ikki so øgiliga nógv hagtøl innan altjóða hondbólt.

Staðfest verður tó í bókini, at donsku jarnkvinnurnar í 1991 vunnu 51-8 á Estlandi, og at hetta er størsti danski sigurin í altjóða hondbóltsdysti. Talan hevur eisini verið um nakrar risa-sigrar í Europa-Cup kappingunum, men tað vit vita um, so hevur munurin ongan tíð verið so stórur, sum hann var tað hósdagin, tá føroyska kvinnulandsliðið spældi.

Brølarin ikki endurtikin

»Jeg har aldrig været så tom af ingenting før en kamp«.

Soleiðis byrjaði Flemming Raben sín part av upplegginum til dystin, tá føroyska liðið hevði taktikfund, og tað vóru sum so ógvuliga sigandi orð.

Hondbólt var talan neyvan um teir 60 minuttirnar, sum dysturin vardi, men føroysku kvinnurnar gjørdu tó sítt arbeiði - og tað ruddiliga. Frá venjarunum vóru boðini fyrst og fremst, at spælararnir ikki máttu fella í grøvina at taka lætt upp á nakra uppgávu. Tí truplari og týðandi dystir enn hesin verða eisini í kappingini, og tí skal konsentratiónin alla tíðina haldast, vóru boðini.

Og við Guinnes-biðlingini á máltalvuni ber væl eisini til at staðfesta, at boðini vórðu tikin í álvara. Men spurningurin er, hvussu stórur álvarin verður í kappingini, tá lond av hesum slagnum sleppa at spæla við. Tað tykist í øllum førum margháttligt, at lond sum Ísrael og Belgia - sum bæði vóru við fyri tveimum árum síðani - ikki sluppu upp í part hesaferð. Hetta tí politiska EHF-ynskið var, at at fleiri av veikaru hondbóltstjóðunum skuldu fáa møguleikan hesaferð. Men sum skilst, so er avgerð longu nú tikin um, at tann brølarin ikki verður endurtikin.



*Fríða Marjunardóttir og hinir spælararnir á føroyska liðnum gjørdu júst sum teimum lysti ímóti einum albanskum liði, sum hevur lítið at gera í einari altjóða hondbóltskapping. Mynd: Alexandar Djorovic*

### FAKTA

Føroyar-Albania 81-1 (36-0)

Føroyar: Ása á Neystabø 15, Anja Heinadóttir 11, Fríða Marjunardóttir 11, Anna Maria Samuelsen 11, Una Olsen 7 (1), Heidi Maria Akselsen 6, Annika Ljósstein Johansen 6 (1), Unn Kragesteen 5 (1), Annika Thomsen 5, Katrin á Neystabø 4.

Albania: Arjola Kazazi 1.

Brotskøst: Føroyar 3/3, Albania 0/0.

Útvísingar: Føroyar 1, Albania 4.

Reytt kort: Mirela Vorpsi, Albania.

Dómarar úr Bosnia-Hersegovina.

Mynd: Rógvi

Annar av føroysku venjarunum, Svein Rógvi Nielsen, hevði tað heilt stóra smílið frammi. Úrslitið sigur tað mesta, sum sigast kann um dystin



GITIÐ LEIKARAN



**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS